# Havnar kvøldskúli prýðir Eysturskúlan

**Leygardagin, 27. mars, og pálmasunnudag, 28. mars, hevur Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli sína 36. framsýning í sambandi við, at kvøldskúlaárið 2009/10 er av**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Framsýningin í ár er sum tey mongu undanfarnu árini í Eysturskúlanum. Tann fyrsta var í Kommunuskúlanum í 1975. Sostatt eru 35 ár liðin síðan ta fyrstu hjá kvøldskúlanum. Tað var ein stór og fjølbroytt framsýning. Síðani vaks hon ár um ár til ta higartil størstu, sum Heðin Mortensen, borgarstjóri setir í Eysturskúlanum leygardagin klokkan 15.

Útboðið av staklærugreinum er í løtuni umleið 130. Hetta kvøldskúlaárið hevur skúlin við túsundtals næmingum – meira enn 2.400 – havt innivist á 44 støðum í Tórshavnar Kommunu.



Tað eru fyrst og fremst tær handaligu lærugreinirnar, ið verða umboðaðar á framsýningini í Eysturskúlanum. Tó eru aðrar ikki handaligar lærugreinir við, eitt nú er kórsangur, rútmiskur tónleikur, sjónleikur, upplestur og dansur á pallinum.

Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli flytir inn í nýístandsett høli eftir páskir. Kommunan hevur keypt húsið hjá Einars Prenti í J.H. Schrøtersgøtu, og kvøldskúlin flytir í fyrstu atløgu inn í tær báðar ovaru hæddirnar. Skúlin fær umframt nøktandi arbeiðsumstøður sítt egna skúlaumhvørvi og møguleika fyri at forma egnu stovnsmentan og læring.

At so nógv fólk ganga í kvøldskúla í Havn er tí, at summi njóta ta góðu sosialu samveru við onnur, summi víðka sín førleika, ið hevur gagnað teimum í teirra gerandisdegi, og onnur, ikki minst fólk úr grannalondum og uttan úr stóru verð vilja læra føroyskt. Og so eru tað tey mongu, ið lata sínar listarligu gávur standa sína roynd. Fyri ikki at siga fólkið, ið vil læra seg at brúka bát, og tey, ið vilja víðka sín kunnleika um Havnar søgu. Haraftrat nema tey sær teldulæru og alnet fyri eldri og fínari matgerð fyri menn og mangt, mangt annað. Alt, ið fær so mong at fylkjast um kvøldskúlan.

Tað er so sjálvsagt, at so nógvar nevndar sum ónevndar lærugreinir vilja sleppa at sýna síni avrik fram. Tí er framsýningin í Eysturskúlanum so margfeld og spennandi. Forsmakkin fingu vit longu seinasta sunnudag í skúlanum í Kollafirði. Ein sera hugtakandi framsýning, ið legði upp fyri avbjóðingunum í Eysturskúlanum hetta vikuskiftið.

Vælkomin á framsýning hjá Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúla.

# Bíbliuskeið umborð á Norrønu

*Poul Jóhan Djurhuus*
*gjaranes@olivant.fo*

Ein annarleiðis Norrønaferð. Smyril Line gongur nýggjar leiðir. Nú verður boðið til bíbliuskeið umborð á Norrønu á túrinum til Seyðisfjarðar mánadagin 31. mai til hósdagin 03. juni. Samskiparar eru Poul Jóhan Djurhuus og Páll á Lakjuni

Teir hava áður verið við til at skipað fyri bíbliuskeiðum á hotellum og í samkomum, og enntá umborð á Gomlu Norrønu meðni hon lá inni við Hulk - men at skipa fyri skeiðum, meðni siglt verður, hava teir ikki roynt áður. Hesar umstøðurnar lata upp fyri møguleikum, sum annars ikki eru til staðar, og hetta er ein spennandi avbjóðing. Samskiparanir vóna, at nógv fólk eisini meina, at hetta er eitt spennandi tiltak og heita á fólk um at koma við á eina annarleiðis Norrøna-ferð.

Farið verður av Havnini mánadagin 31. mai kl.14.00. Táið fólkið hevur notið eina góða máltíð, annaðhvørt á bufféini ella á cafeteria, so verður boðið til fyrsta bíbliutíman kl.19.30. Teir, sum hava bíbliutímarnar verða Hjørleif Vang úr Kaldbak, Rógvi Joensen úr Klaksvík, Svenning av Lofti úr Havn, Páll á Lakjuni úr Fuglafirði og Poul Jóhan Djurhuus av Glyvrum. Tað verða seks bíbliutímar í alt.

## Evnir

Evnini verða ymisk, sum t.d. hjúnabandið, familjan og tríggjar minniligar sjóferðir. Eisini verða onnur evnir á skránni. Luttakarnir verða trý kvøld umborð á Norrønu og hesi kvøldini verður skipað fyri kvøldsetum. Mánakvøldið og mikukvøldið verður skipað fyri sangløtu. Týskvøldið kl.21.00 verður kvøldseta, har Svenning av Lofti kemur at hava søgur um ymiskar andaligar sangir, og okkurt, sum minnir um væl umtóktu sendingarnar “á Torginum.”

Tíðliga týsmorgunin verður siglt ígjøgnum stórsligna Seyðisfjørðin, og fellur tað á ein sólríkan stillan morgun, sum góður møguleiki er fyri, so verður tað ein stórsligin og sera vakur siglitúrur, við teimum høgu og sermerktu Íslensku fjøllunum til báðar síður. Inni í botninum liggur Seyðisfjørður, har komið verður til bryggju kl.09.00. Norrøna kemur at liggja á Seyðisfirði bæði týsdagin og mikudagin. Luttakarnir koma at búgva umborð meðni skipið liggur við bryggju. Farið verður av Seyðisfirði mikukvøldið kl.20.00

## Útferð

Týsmorgunin kl.10.00 er næsti bíbliutími, og eftir døgurða verður útferð gjørd til Mývatn við føroyskum bussi, sum er við á ferðini. Mývatn hevur nógv at bjóða ferðafólkum. Fyri 6 árum síðani opnaði 5000 m2 stóra Lagoonin, sum er eitt uttandura náttúru baðistað. Vatni hevur ein støguðan hita, sum liggur millum 36 og 40 stig. Baðistaðið er eitt av teim stóru ferðafólkamálunum í Íslandi. Møguleiki verður undir útferðini at vitja Lagoonina við Mývatn. Meðan vit eru við Mývatn verður bjóðað til eina máltíð. Útferðin og máltíðin er íroknað ferðakostnaðin. Kl. 21.00 verður kvøldseta umborð, har vit m.a. fara at hoyra um ymiskar søgur aftanfyri sangir, sum vit kenna frá møtum og Gudstænastum.



Norrøna liggur við bryggju á Seyðisfirði allan mikudagin. Tveir bíbliutímar verða fyrrapartin. Seinnapartin verður møguleiki at halda frí ella fara eina útferð til Egilstaðir, sum ikki liggur so langt frá Seyðisfirði. Egilstaðir hevur uml 2000 íbúgvar. Hendan útferðin er eisini íroknað ferðakostnaðin. Kl.20.00 verður lagt frá landi, og meðan siglt verður út gjøgnum náttúruríka Seyðisfjørðin, verður aftur sangløta umborð.

Meðan siglt verður heim verða tveir bíbliutímar fyrrapartin, og kl.15.00 verður lagt til bryggju í Tórshavn. Vónandi hava luttakarnir tá havt eina minniliga og annarleiðs Norrøna-ferð millum Føroyar og Ísland, har borðreitt varð bæði til sálar og likams.

Samskiparnir vilja fegin sláa fast, at ferðin er ikki ætlað ávísum aldursbólkum ella ávísum trúarbólki, men samskiparnir vilja fegin síggja fólk í øllum aldri og frá øllum samkomum og kirkjum – øll eru hjartaliga vælkomin at vera við – eisini tey, sum ikki ganga á møti ella kirkju.

Ferðin kostar 1995,00 krónur. Tá er íroknað: SiglingTórshavn–Seyðisfjørður og aftur í 4-koyggjukamari uttan vindeyga. Útferð til Mývatn við einari máltíð, og útferð til Egilstaðir, tó ikki við mátíð. Máltíðir umborð eru ikki við í ferðakostnaðinum.

Tilmelding og kunning um ferðina: martinj@smyril-line.fo ella á telefon 215909 Eisini er møguleiki at seta seg í samband við Poul Jóhan Djurhuus, t-post: gjaranes@olivant.fo ella tlf: 228314. Seinasta freist at melda til er 15. apríl.

